# Eftiransing við myndatóli eigur at vera síðsta loysnin

**Í ávísum førum ber tað til at seta upptøkutól upp fyri at ansa eftir fólki, sigur Dátueftirlitið**

BROTSVERK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað kann ikki útihýsast, at tað ber til at seta upptøkutól upp ymsastaðni at ansa eftir fólki. Men tað skal vera innanfyri heilt ávísar karmar.

Tað sigur Ingunn Eiriksdóttir, stjóri í Dátueftirlitinum.

Hon sigur, at spurningurin um at ansa eftir fólki við upptøkutólum er lógarfest í ymsum lógum. Vit hava bæði persónsupplýsingarlógina, lógina um "forbud mod privates tv-overvågning" og harumframt hevur eisini revsilógin reglar um hesi viðurskifti.

- Reglurnar eru ymiskar alt eftir hvør tað er, sum ansar eftir og hvør útgerð verður nýtt. Men yvirskipað kann sigast, at privat kunnu ikki hava eftirlit við fólki á almennum plássum.



*- Verða treytirnar í lógina hildnar kann ikki útihýsast, at eftiransing við upptøkutólum ber til fyri at tæna ávísum sakligum endamálum. Og at uppklára brotsverk kann vera eitt sakligt endamál, men fyrst eigur at verða umhugsað, um endamálið ikki kann røkkast á annan hátt, sigur Ingunn Eiriksdóttir, stjóri á Dátueftirlitinum*

- Verða treytirnar í lógina hildnar kann tað ikki útihýsast, at eftiransing við upptøkutólum ber til fyri at tæna ávísum sakligum endamálum.

Men hon leggur dent á, at hetta er eitt stórt inntriv í privatlívið hjá fólki.

- Verða upptøkutól sett upp, verða øll skrásett, sum eru á plássinum, sum upptøkutólið er á og tað er eitt álvarsligt inntriv í privatlívið.

- Tí er tað ein treyt, at eitt slíkt inntriv hevur sera stórt samfelagsligt gagn.

Men hon heldur eisini, at eitt so stórt inntriv eigur altíð at vera seinasta loysnin, sum bara eigur at roynast, tá ið allir aðrir møguleikar eru troyttar til fánýtis.

### Skal vera sakligt

Hon sigur, at hon kann ikki siga nakað um ítøkilig mál, ella ítøkiligar ætlanir. Tí tosar hon bara um málið yvirskipað.

- Er endamálið við einum upptøkutóli at uppklára brotsverk, er hetta eitt sakligt endamál, men tó má umhugsast um endamálið ikki kann røkkast á annan hátt, eitt nú við at løgreglan er sjónligari í býnum.

- Hetta er eitt so stórt inntriv í rættartrygdini hjá fólki, at tað eigur ikki at vera sett í verk, fyrrenn allir møguleikar eru troyttir fyri at røkka endamálinum á annan hátt.

Tað heldur Dátueftirlitið hevur eina største týdning í slíkum føri.

Hinvegin sigur Ingunn Eiriksdóttir, at tað kunnu eisini hugsast at vera dømi, har ágóðin er so mikið stórur, at fólk eiga at tola, at tey verða eftiransað við upptøkutóli.

- Men verða upptøkutól sett upp, skulu reglar gerast um trygdina hjá teimum, sum verða eftiransað. Í hesum sambandi er tað altíð ein treyt, at skelti eru sett upp, har tað stendur, at økið verður eftiransað við upptøkutóli, og tað er eisini ein treyt, at upptøkutólið skal ikki geva fleiri upplýsingar enn neyðugt.

Í hesum sambandi nevnir hon, at eitt mál hevur verið uppi í sambandi við eitt vevmyndatól hjá Strandferðsluni á kajøkinum í Klaksvík. Snýr tað seg um vevmyndatól, er treytin vanliga, at fólk skulu ikki kennast aftur á myndini, uttan so at tey hava givið samtykki.

Í málinum um Strandferðsluni var endamálið at síggja, hvussu nógvir bilar bíðaðu eftir at sleppa við strandfaraskipunum.

- Í hesum føri metti Dátueftirlitið, at tað var nóg mikið at síggja bilarnar og ikki, hvør var í teimum. Tí setti eftirlitið sum treyt, at myndin skuldi zoomast út og at myndin skuldi vera svørt/hvít og so kornut at persónar ikki kundu kennast aftur.

Men hvør skal so meta um, hvussu neyðugt tað er at seta upptøkutól upp.

- Tað má vera tann, sum setir upptøkutólið upp, men frammanundan mugu tey so hava gjørt sær greitt, at treytirnar í lógini eru hildnar.

- Men ein og hvør, sum verður avmyndaður, kann gera vart við seg hjá tí, sum hevur sett upptøkutólið. Er talan um eitt øki, sum er fevnt av Dátueftirlitinum, ber til at gera vart við seg hjá eftirlitinum og annars ber altíð til at melda ella royna málið í rættinum.

Men hon leggur afturat, at er ætlanin at fara út um tað, sum lógin loyvir til, verður neyðugt at broyta lógirnar.

# Skálafjarðartunnil má ikki draga út

**Tað hevur alstóran týdning, at arbeiðið at gera Skálafjarðartunnilin ikki dregur út. Tí skal tunnilin hvørki bjóðast út ella verða almennur, siga tær tríggjar kommunurnar við Skálafjørðin**

SKÁLAFJARÐARTUNNIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Arbeiðið at gera undirsjóvartunnilin ímillum Skálafjørðin og Streymoynna, má undir ongum umstøðum draga út.

Tað kann Hans Jacob Lamhauge, borgarstjóri í Runavík ikki siga nóg greitt.

Og hann talar ikki bara fyri seg sjálvan.

Teir tríggir borgarstjórarnir í Runavík á Nesi og í Sjóvar Kommunu, hava nú lagt seg út í kjakið um Skálafjarðartunnilin og um hann skal bjóðast út ella ikki og um hann skal vera privatur ella almennur.

Í eini áheitan á politikararnar heita teir tríggir staðiliga á teir um at hildið verður fram eftir tí leisti, sum arbeitt hevur verið eftir nú í fleiri ár.

Tað merkir, at teir vilja, at politikararnir skulu lata privata partafelagið fyri Skálafjarðartunnilin sleppa ígongd við arbeiðið.

Og tað skal vera uttan drál.

### Skunda undir

Hans Jacob Lamhauge sigur, at tað, tey ræðast allarmest, er, at arbeiðið upp á tunnilin verður seinkað.

- Orsøkin til at vit tríggir borgarastjórarnir gera vart við okkum, er fyrst og fremst fyri at skunda undir ætlanina, sigur hann.

Tí heldur hann, at tað hevur stóran týdning, at tað verður partafelagið, sum hevur arbeitt við ætlanini alla tíðina, eisini sleppur at fullføra hana.

- Verður arbeiðið nú bjóðað út, fer tað bara at seinka tunlinum. Og skal hann verða almennur, verður hann partur í eini raðfesting hjá landinum Har eru nógvir tunlar frammanundan og so veit ongin, hvar í raðfestingini, Skálafjarðartunnilin verður.

- Hetta er eisini ein so mikið stór verkætlan, at skal hann verða almennur, fer hann at binda landsins fíggjarorku í fleiri ár og sostatt fer hann at forða fyri útbyggingum aðrastaðni. Tí halda vit avgjørt ikki, at tunnilin skal leggjast undir tað almenna, sigur Hans Jacob Lamhauge.

Men verður hann boðin út, hevði tað so seinkað honum í meiri enn eitt ár, ella so?

Tað vita vit ikki. Verður pilkað við ætlanina nú, er ómøguligt at vita, hvørja lagnu hon fær. Tað einasta, vit vita, er, at tey, sum hava arbeitt við tunlinum, eru komin væl áleiðis og eiga at sleppa at halda fram fyri at stígur ikki skal koma í.

Landsverk sigur eisini, at verður tunnilin privatur, fer tað at vera væl dýrari at koyra ígjøgnum hann, tí kravið til avkast fer at verða størri, enn um tunnilin var almennur?

- Hatta duga vit ikki at síggja. Vit duga bara at síggja tað, at verður tað ov dýrt at brúka hann, fara fólk bara at koyra tað gomlu leiðina eftir oyggj ístaðin, tí tað kostar einki. At vit longu hava eina farleið eftir oyggj, er best hugsandi prístillagingin, sum hugsast kann, sigur hann.



*Tað, sum borgarstjórarnir við Skálafjørðin ræðast mest, er, at arbeiðið at gera Skálafjarðartunnilin, verður seinkað. Tí vilja teir hava Løgtingið at lata privata partafelagið sleppa ígongd við arbeiðið og tað skal vera uttan drál*

Annars skulu helst samráðingar verða millum felagið, sum skal gera tunnilin og landið um eina loysn, sum er so bílig sum gjørligt.

- Verður tað ov dýrt, verður tað so undir øllum umstøðum bara tey, sum brúka tunnilin, sum koma at gjalda og ikki øll hini, sigur Hans Jacob Lamhauge.

### Hevur stóran skund

Borgarstjórin í Runavík sigur, at tað merkja týðiliga, at bæði privatfólk og vinnulív bara bíða eftir, hvørja lagnu, Skálafjarðartunnilin fær.

- Verður tunnilin gjørdur, hevur tað ongan týdning at búgva á Skálafjørðinum og at arbeiða í Havn, tí tað verður lítil munur á at búgva á Skálafjørðinum og at búgva í Hoyvíkshaganum.

- Tað sama ger seg galdandi fyri vinnulívið, tí eisini vinnuliga hevur tað alstóran týdning fyri framtíðarætlanirnar at vita, hvørja lagnu tunnilin fær.

Hans Jacob Lamhauge sigur, at fyri framtíðarætlanirnar hevur tað sostatt stóran týdning, at ein avgerð verður tikin um tunnilin sum skjótast, so at bæði privatfólk og vinnulív kunnu leggja til rættis eftir tí.